## Ísrael og Iran á fundi

Sambært einum ísraelskum blaði hava týðandi embætismenn úr Iran og Ísrael tingast um kjarnorkuvápn. Iran vísir tíðindunum aftur. Blaðið Ha´aretz sigur frá sínum keldum, at embætismenninir hildu fleiri fundir í egyptiska høvuðsstaðnum Kairo 29. og 30. september. Fundirnir vóru liður í einum avvápnaðarátaki, sum tann avstralska stjórnin setti í verk fyri einum ári síðani. Eru tíðindini í Ha'aretz sonn, er tað fyrstu ferð síðani kollveltingina í Iran í 1979, at beinleiðis samband hevur verið millum Ísrael og Iran, skrivar Reuters.



## Cheney hartar Obama

Í USA hevur tað verið ein óskrivað regla, at fyrrverandi forsetar og varaforsetar eiga ikki at finnast at sínum eftirmonnum, men hesa regluna leggur fyrrverandi varaforsetin Dick Cheney ikki nógv í. fer sera misnøgdur við Afghanistan-politikkin hjá Barack Obama, forseta. Cheney, sum var varaforseti hjá George W. Bush, segði í einari røðu í Washington, at Obama tykist vera bangin fyri at taka neyðugar avgerðir, tá talan er um kríggið í Afghanistan. Hann segði, at ivin hjá amerikanska forsetanum kundi vera vandamikil fyri teir útlendsku hermenninar í Afghanistan.

# Søguliga Klaksvíkin inn í fr

**- Mín visjón er at endurskapa ta fjøruna og tann hugnan, sum eyðkendi søguligu Klaksvíkina og á tann hátt taka fortíðina við inn í framtíðina, sigur Archibald Black, stigtakari til nýggju miðbýarætlanina**

MIÐBÝARÆTLAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Hóast uppskotið hjá Archibald Black og Gunnari Nolsø til nýggja miðbýarætlan fyri Klaksvíkina í mangar mátar er stórsligið, er lítil ivi um, at sálin í ætlanini býr í gamla fjøruumhvørvinum á Biskopstø.

### Endurskapa fjøruumhvørvið

Tí er eitt av endamálunum við ætlanini onki minni enn at endurskapa gamla umhvørvið í fjøruni har, sum eldru klaksvíkingar minnast tað

- Fyri okkum hevur tað sera stóran týdning at skapa tað fjøruna, sum ikki er longur og tann hugnan, sum heldur ikki er longur, sigur Archibald Black, sum á tann hátt sær fyri sær, at






gamli samleikin hjá Klaksvíkini verður tikin við inn í framtíðina.

Ítøkiliga er ætlanin at gera eina stóra timburmarina í fjøruni á Biskopstø við siglingarrennu, har møguleiki eisini verður at sigla við til dømis kanoum og pedalbátum.

Hetta skal tó alt gerast í einum stíli, sum hóskar til gamla partin av fjøruni. Millum annað verða bakkakjallarin, neystið og hoyggjhúsið hjá Nólsoyar Páll sett í upprunaligan stand aftur soleiðis at fortíðin verður ein nátúrligur partur av tí nýggja.

Eisini verður nátúrliga fjøran fram við Seglhúsinum og spinnarínum hjá Monu endurskapt og um alt gongur eftir ætlan, er ikki óhugsandi at partur av Seglhúsinum verður til eina hugnaliga matstovu.

### Góður gróðrarbotnur

Beint nú eru góð útlit fyri, at nýggja miðbýarætlanin væl kann gerast veruleiki. ì øllum førum hevur Klaksvikar Býráð gjørt av at lata uppskotið verða grundarlag í einum víðari kjaki um nýggja miðbýin í Klaksvík.

- Býráðið heldur í øllum førum grundhugsjónina í ætlanini vera sera spennandi - ikki minst tí styrkin í ætlanini eru mongu rekreativu økini, har trivnaðurin